Góðu foreldur

Skúlastýrið í Sankta Frans Skúla vil fegin bjóða tykkum til felags foreldrafund í fimleikahøll skúlans 29. oktobur klokkan 19.

Vit fáa vitjan av Elini Michelsen, sum er serkøn í samskifti á sosialu miðlunum og er partur av SSP-samstarvinum.

Digitali heimurin gerst ein alsamt størri partur av gerandisdegnum og børnini brúka ein størri og størri part av degnum við skerminum sum nærmasta fylgisveini. Hvussu skulu vit foreldur bera okkum at við at geva teimum eina sunna uppaling? Og hvat er ein sunn uppaling í hesum digitalu tíðum?

Elin Michelsen fer at hava ein fyrilestur fyri okkum um onlinelívið hjá okkara ungu og børnum. Hon fer millum annað at nerta við nógv umtalaða og millum børnini væl umtókta spælið Fortnite, sum er ein stór marra hjá nógvum foreldrum og í ávísan mun ein hóttan fyri felagsskapin.

Formaðurin í skúlastýrinum fer at greiða stutt frá, hvat skúlastýrið hevur arbeitt við seinastu tíðina og fer at arbeiða við frameftir, og vit fáa eisini høvi at hitta nývalda næmingaráð skúlans.

Vónandi síggja vit mong tykkara,

Vegna skúlastýrið

Danjal av Rana, formaður.